# Jólaoratorium í Fríðrikskirkjuni og í Hoyvíkar Kirkju

**Alt síðan føriskir kórsangar seinast í 60-árunum fingu sær samband við úrmæltar kórleiðarar uttanífrá, hevur siðvenjan at framføra eisini størri tónaverk við solistum og orkesturfylgispæli vaksið seg fram í Føroyum.**

Hesar framførslur vóru í sínum uppruna aðalinnihaldið í árligu kórstevnum. Føroyakórið, ið kom í lag í sambandi við upplatingina av Norðurlandahúsinum, tók táttin upp við stevnuhaldinum "Summartónleikadagar í Norðurlandahúsinum", har kórsangur á hægri stigi var miðdepilin. Eisini í øðrum samarbeiði millum kórsangarar hava kór- og orkesturverk eftir tónaskøld sum Bach, Händel, Haydn, Mozart, Beethoven og Brahms framførd helst í Norðurlandahúsinum.

Eftir at hetta samstarv millum kór í Føroyum fjaraði burtur hevur Havnarkórið sum best hildið fram við hesari framsøknu siðvenju eitt nú við aðru hvørja ferð at framføra Händels Messias og Jólaoratorium J. S.Bachs fram móti jólum. Seinasta ár fekst við nýggju samferðslumøguleikunum samstarv í lag millum Havnarkórið og kvinnukórið "Suð" í Klaksvík um framførslu av "Messiasi" í Christianskirkjuni og í Norðurlandahúsinum, og í ár er Havnarkórið einsamalt um uppgávuna aftur at framføra Jólaoratoriið. Tvær framføslurnar verða:

Leygardagin 15. desember kl. 16.00 í Fríðrikskirkjuni og sunnudagin í Hoyvíkar Kirkju kl. 16.00.

Solistar verða Berghild Poulsen, sopran, Sigríður Aðalsteinsdóttir, alt, Eyjólfur Eyjólsson, tenorur og Águst Ólafsson, bassbariton. Orkestrið er samansett av musikkskúlanæmingum og – lærarum og professionellum tónleikarum úr Íslandi og úr Danmark. Leiðari er Ólavur Hátún.



*Águst Ólafsson*



*Berghild Poulsen*



*Eyjólfur Eyjólsson*



*Sigríður Aðalsteinsdóttir*

### Um solistarnar

Berghild Poulsen hevur læraraprógv frá Føroya Lærarskúla við tónleiki sum linjugrein. Tíðliga gav hon til sjóndar sínar serstøku songgávur.

Berghild hevur sungið nógv í kórum og tey seinastu mongu árini í Havnarkórinum. Í hesum umhvørvi kom hon í samband við úrvaldar sanglærarar sum André Orlowitz úr Pollandi og gitnu íslendsku operusangarinduna Ólöf Kollbrún Harðardóttir.

Í kórsins framførslum av størri verkum sum t.d. Skapanini eftir Haydn, Händels Messias, Jólaoratorium Bachs og Ein deutsches Requiem eftir Johs. Brahms hevur Berghild Poulsen við síni ljómandi, kenslubornu rødd ikki smæst burtur undir liðini á professionellum solistum uttan úr heimi.

Sigfríður Aðalsteinsdóttir tók endaligt prógv frá Sangskúlanum í Reykjavík á vári 1995. Høvuðslærarar hennara vóru Elísabet F. Eiríksdóttir og Þuriður Pálsdóttir. Á heysti 1995 byrjaði hon útbúgving sína á operudeild Tónlistarháskúlans í Wien og leyk har endaligt prógv við hægsta stigatali í 2000.

Tíðina í Wien hevði Sigríður ymsar operuleiklutir so sum "Triðja dama" í Gandafloytu Mozarts, Fjodor í Boris Godunov og Mercedes í Carmen.

Á Íslendsku Operuni hevur Sigríður umframt áðurnevnda leiklut í Gandafloytuni eisini verið Marcellina í Figaros Brúdleypi og Mother Goose í Rake´s Progress.

Umframt sítt operuvirksemi hevur Sigríður Aðaslsteinsdóttir havt hópin av solokonsertum og verið solistur saman við kórum, Symfoniorkestri Norðurlandsins og Íslendska Symfoniorkestrinum.

Eyjólfur Eyjólfsson fekk sína tónlistarligu grundútbugving bæði sum floytuspælari og sum sangari á Tónlistarskúlanum í Hafnarfirði, haðan hann leyk endaligt prógv á vári 2002.

Eftir beinleiðis framhald í trý ár á Guildhall School of Music and Drama í London tók hann master-prógv og Postgrade Diploma fra operudeild skúlans.

Eyjólfur hevur havt sololeiklutir saman við hópin av kórum og orkestrum bæði úti og heima. Nevnast kann t.d tann krevjandi tenorparturin í Händels Messiasi í Maenstranza operuhúsinum í Sevilla. Umframt ymsastaðni í Onglandi hevur Eyjólfur havt framførslur eisini aðrastaðni í Europa eitt nú í Fraklandi, og seinasta ár hevði hann solokonsert saman við klaverleikaranum Eugene Asti í konserthøllini á Tónlistarakademiinum í Moskva.

Í Føroyum gjørdist Eyjólfur kendur í tónleikaheimi, tá hann sang tenorlutin í fyrstu førisku operuni Í Óðamansgarði eftir Sunleif Rasmussen, eins og føringar eisini hava hann í minni sum tenorsolist í Requiem Mozarts, sum Føroya Symfoniorkestur og Symfonikór framførdu á 200 á minningarhaldi um tónaskaldið í Norðurlandahúsinum á vári 2006.

Ágúst Ólafsson fekk sína byrjandi sangundirvísing í heimbýnum Reykjavík. Framhaldandi lærdi hann á Sibelius Akadamiinum í Helsinki hjá Jorma Hynninen og Sauli Tillikainen. Samstundis søkti hann sær lærdóm og førleika á skeiðum í Týsklandi hjá heimsgitnu sangarunum Elisabeth Schwarzkopf og Dietrich Fischer-Diskau.

Ágúst hevur havt solokonsertir, í Íslandi, Noreg, Svøríki, Finnlandi og Týsklandi. Í altjóða sangkapping á Hugo Wolf Akademiinum í 2004 vann hann aðru viðisløn saman við pianistinum Izumi Kawakatsu.

Í operusangi hevur Ágúst Ólafsson havt gitnar leiklutir sum Don Giovanni og sum greivin í Figaros Brúdleypi, operum Mozarts, og sum Don Carlos í Verdis opera.

Annars er Ágúst javnan solistur í oratorium Bachs og Händels. Í Føroyum hava vit upplivað magnmiklu rødd hansara í Mozarts Requiem saman við Føroya Symfonikóri og -orkestri og seinasta ár hevði hann somuleiðis basslutin í Händels Messiasi í framførslu saman við kvinnukórinum "Suð" og Havnarkórinum við tess oratoriiorkestri.

# Innihaldið í Jólaoratorium J. S. Bachs.

**KONSERT**

*týðing: þóra þóroddsdóttir*

Um Jólaoratoriið, sum nú um vikuskiftið verður framført í Fríðrikskirkjuni og í Hoyvíkar Kirkju, skrivaði Jón Stefánsson:

Jesu føðing og deyði – jól og føsta – hava frá fyrstu døgum kristindómsins verið listamanninum ein ótømandi kelda, og hesi bæði hugtøkini hava mangan verið tulkað í máli, myndum og tónum.

Krossurin á Golgata, tann grýtuta leiðin, og so tað øvugta. Jólini. Stjørnan yvir Betlehem. Seyðamenn á nátt. Undrið, ið teimum varð fyri. Onki listaverk megnar at lýsa hetta, og listin endurgevur bert eina glæmu av dýrdini, fjósinum í Betlehem, Jósefi, Mariu og nýborna jødakonginum í krubbuni.

Tann, ið lesur hesar reglur, verður leiddur tann vegin. Framførslan fevnir um tríggjar teir fyrstu partarnar av Jólaoratorii J. S. Bachs, og tvær ariur og ein kórsats úr seinni partum av verkinum. Hesi brotini siga hvør sín part av søguni um Jesu føðing, og leikpallarnir eru ymiskir.

Fyrst kemur ein lovsongur. Hann kemur! Maðurin, ið profetarnir greiddu frá, trínur fram á pallin! "Lovið honum við ljóði av lúðrum, lovið honum við hvøllum paukusløgum. Bach tekur undir við Dávidi kongi, tey kongaligu ljóðførini, trompetir og slagljóðførir ljóma av sonnum, og tann kristni heimurin kemur uppí part í inngangsskórinum:" Jauchzet, frohlocket!" (Fegnist, lovsyngið!)

Evangelisturin trínur fram. Hann greiðir frá orðum Lukasar:"Men tað hendi í teimum døgum ..." (resitativ, nr. 2 í verkinum). Bíbliuorðini ljóða rein og óspilt. Bach heldur seg til søguna. Fylgispælið eru bert nakrir fáir tónar frá cembalo og cello. Eru tit til reiðar at taka ímóti frelsaranum? Bach gevur okkum góða fyrireikingartíð ( recitativið nr. 3 og songlag nr. 4). Tú tekur ikki ímóti einum kongi í gerandisklæðum. Kórið tekur á seg lutin sum kirkjulið og syngur ein sálm: Hvussu taki eg ímóti tær? (nr. 5, sum er kórsatsur).

Var tað tilvildarligt, at Bach valdi lagið til "Á høvuð blóði roði" sum minnir okkum á ta lagnu, ið barninum í krubbuni varð tillutað. Hava vit kanska ikki longur fyri neyðini at fáa slíka áminning?

Men hann kom! Evangelisturin heldur fram at greiða frá (recitativ sum nr. 6 í verkinum)." Hon átti son sín hin fyrstafødda". Síðani kjakast bassrødd og og sopranrøddir ( nr. 7 ), har vit verða mint á, at Jesus varð borin í heim uttan ríkidømi og vald at handa okkum dýrgripir. Tey forngriksku orðini, ið nýtt vórðu sum álitisheilsan, tá nýggir kongar komu til vald og ræði, eru eisini har. "Kyrie eleison!" (Harri miskunna okkum!)

Tann fyrsti parturin endar við, at barnið verður rurað í blund (sálmalag nr. 9) og kórið tulkar tað, sum meinigheitin vónar: Lat Jesusbarnið festa røtur í mannahjørtum.

Soleiðis heldur Bach á at veva sín likstarvev, og hvør partur fær sín leikpall. Í øðrum parti eru vit á Betlehems vøllum. Fýra oboir trína inn á pallin, ljóðførir hjá seyðamanninum, Himmal og jørð eru í einum í eini sinfonia (nr. 10). Oboirnar skifta orð við streingir og floytur. Evangelisturin greiðir frá (nr. 11: recitativ):"Og tað vóru hirðar har í bygdalagnum ..." Eingilin boðar frá: "Óttist ikki"." Streingirnir eru í samljóði við eingilin og lyfta boðskapin á hægri stig við aðrari frásøgn úr bíbliuni.

Songløg, recitativ og sálmaløg hvørt um annað. Hvør partur tekur undir við tí, sum tulkað verð frammanundan, og kagar djúpari. Tey himmalsku herliðini framføra tann fyrsta jólasálmin (nr. 21):"Heiður verði Gudi í hægsta himli". Bach letur lagið av einslistum í heiðursbúna. Meginstevini eru trý:"Ehre sei Gott","und Friede auf Erden" og "und den Menschen ein Wohlgefallen". Tónameistarin tvinnar stórsligna heild av hesum træðrum. Mangan ljóðar kórið sum kaldir einglar, ið hava bráskund at sleppa inn í himmalin. Vónandi situr áhoyrarin so fjálgt, at hann kann skoða listarverkið til lítar!

Tann triði parturin sigur frá seyðamonnunum, ið halda leiðina fram at finna barnið í krubbuni og vísa tí virðing sína. Vit hoyra lovsong, trompetir og paukur trína fram á pallin. Seyðamenninir skunda sær at hyggja nærri at tí, ið Dávid kongur hevði kunngjørt teimum, og Bach tulkar hetta sum ein sannur meistari. Tú hoyrir, hvussu teir trokast hvør um annan í miklari undran, men eru tó ekkaleysir."Lassen uns nun gehen gen Betlehem (nr. 26), "Latum okkum nú fara beinanvegin til Betlehem og vita um hesi tíðindi, sum hend eru, og sum Harrin hevur kunngjørt okkum".

Tú dvølir eitt bil við Mariu Gudsmóðir, ið hugleiðir um orðini hjá seyðamonnunum. Inngangskórið til triðja part verður sungið av nýggjum (nr.24). Tann mynd, ið fyrr kom til sjóndar, verður nú staðfest við lít.

Tvey songløg úr 4. parti verða framførd. "Flösst mein Heiland", ið sopran og afturljóðandi sopranrødd, uggandi til frelsu, syngja saman við obo stuðlandi uppií.

Hetta man vera eitt av kendastu brotum í verkinum.

Tenorlagið "Ich will nur dir zu Ehre leben" er ein størsligin táttur í verkinum. Tvær solofiólir, solosangari og cello flættast í eina heild."Eg vil liva tær til heiðurs, gev mær megin, gev mær treysti".

Við inngangskórinum til fimta part endar oratoriiframførslan. "Ehre sei dir Gott gesungen" (Heiður veri tær, Gud, framborin). Oboirnar saman við strúkarum ljóða av nýggjum, og fagnaðarrómurin er heilt serstakur.

Førisk

Sum eitt serligt ískoyti endar framførslan á hesum sinni við "Nú fjøll og firðir blunda", lag og satsur: J.S.Bach, orð: Oskar Hermansson.